## Nuuk, Reykjavík og Havn stuðla

Týsdagin hevði Grunnurin Nuuk, Reykjavík og Tórshavn fund í Nuuk, har stuðul til ymisk endamál, sum viðkoma teimum trimum høvuðsstøðunum í Útnorði, varð latin. Fyri Havnina luttóku Heðin Mortensen, borgarstjóri, Jógvan Arge, varaborgastjóri og Høgni Mikkelsen, býráðslimur. Samlaða stuðulsupphæddin, sum grunnurin hevur tøka, er 632.170 krónur. Peningur varð býttur til Grønlendska landsbókasavnið, 9A í Qorsussuaq skúla, Kvinnuhúsið í Tórshavn, Norðurlandahúsið í Føroyum, Hondbóltssamband Føroya, Tórshavnar Stórband, Absalon Hansen, Listasavn Reykjavíkar, Humanistiska Fakultetið á Lærda Háskúla Íslands og Fróðskaparsetri Føroya og Áhugamyndafelagið Fókus.

## Landsskjalasavnið 75 ár



Í ár eru 75 ár, síðani Landsskjalasavnið varð sett á stovn. Í tí sambandi skipar stovnurin fyri móttøku og trimum almennum tiltøkum í Norðurlandahúsinum 31. august og 1. september. Á móttøku fyri innbodnum fyrra dagin fer Kulturministeriet at avhenda skjøl frá frá 18. og 19. øld frá Kgl. Einahandlinum, ið hava verið í varðveitslu á danska Ríkisskjalasavninum í meiri enn 100 ár. Skjølini verða handað Jógvani á Lakjuni, mentamálaráðharra, ið síðani handar tey víðari til Sámal T.F. Johansen, landsskjalavørð. Savnið er ein hin týdningarmesta keldan til føroyska søgu hetta tíðarskeiðið og fer hendan afturbering tí at betra um grundarlagið fyri føroyskari søgugransking, heldur Landsskjalasavnið.

# m slag í heiminum

- Er talan um partrolarar, má hyggjast eftir, hvussu nógvan fisk nýggja parið drepur í mun til tað gamla, segði Kjartan.



*- Skal fiskidagaskipanin framhaldandi verða ábyrgdarfull – eisini mótvegis umheiminum - mugu vit vita, hvat ávirkar veiðievnini, og hvussu hesi broytast, men her standa vit nærstan á berum, sigur Kjartan Hoydal*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

### Ein »grundlóg«

Lógin um vinnuligan fiskiskap er eitt slag av »grundlóg« fyri fiskiveiðini undir Føroyum, og hendan lógin stendur aftanfyri eina skipan, ið eigur at verða burðardygg, bæði lívfrøðiliga og búskaparliga.

- Tey lond, sum hava kvotur, noyðast javnan at stilla hesar, og hetta kann skapa ótrúligar trupulleikar. Okkara fiskidagaskipan er hinvegin rættiliga konservativ, men broyta vit skipanina ov nógv frá tí upprunaliga, verður neyðugt at stilla hana alla av nýggjum.

Kjartan segði, at ein kvotuskipan riggar væl í »reinari« veiði, sum eitt nú eftir pelagiskum fiskasløgum, men í einum blandings fiskiskapi, sum okkara botnfiskaveiða er, er okkara skipan við fiskidøgum, stongdum leiðum og krøvum um meskavíddir ógvuliga effektiv, sum hann tók til.

Í framløguni endurtók hann, at lívfrøðiliga ráðgeving ikki er nóg góð.

- Tað er trupult at brúka árligar stovnsmetingar fyri at meta um, hvussu nógv vit kunnu veiða. Gamla skipanin hjá ICEC at meta um hvønn stovnin sær við yngulkanningum og yvirlitstrolingum er ikki nóg góð, tí tað liggja so nógvar óvissur í hesum yvir eitt ár. Slíkar metingar siga meira um søguna, tá ið tíðin gongur.

### Hóskandi dagatal

Kjartan vísti á, at Fiskirannsóknarstovan er gingin burtur frá at brúka veiðidagbøkur, men byggir sínar metingar meira og meira á yvirlitstrolingar, sum hann metir eru ógvuliga svingandi og óvissar.

- Eg havi funnist at hesum mátanum at ráðgeva, tí eg haldi, at stovnurin í alt ov lítlan mun greiðir frá teimum óvissum, sum eru við hesum metingum. Tú fært eitt tal, men fært einki at vita um tær óvissur, sum eru. Eg haldi ikki, at slíkt kann brúkast til at stilla veiðitrýstið í eini fiskidagaskipan eftir – her og nú.

Hann segði, at tá ið ferð eftir ferð hevur verið róð uppundir, at ov nógvir dagar vóru inni í fiskidagaskipanini í byrjanini, er hetta ein póstandur, sum ikki er rættur.

- Hetta eigur at manast í jørðina, legði hann aftrat.

### Mótstøðuførur toskur

Í framløguni nam Kjartan við toskaveiðina undir Føroyum gjøgnum eina heila øld og segði, at veiðan hevur verið skiftandi, stundum góð og stundum minni góð.

- Men tað hevur altíð víst seg, at toskastovnurin kom fyri seg aftur – eisini eftir kreppuárini fyrst í nítiárunum.

Hann vísti á, at nú regluligar gróðurkanningar verða gjørdar, og hesar seinnu árini hava víst, at gróðurin er undir miðal, hevur eisini verið væntandi, at toskastovnurin fór at minka.

Alt bendir á, at lítil toskur er til í løtuni, men Kjartan helt ikki, at veiðitrýstið er høvuðsorsøkin til hetta. Heldur er tað gróðurin, sum hevur verið lakur.

- Eg haldi, at toskurin undir Føroyum er ógvuliga mótstøðuførur móti fiskiskapi. Hetta sóu vit eisini í sínari tíð, tá bretar royndu í klettin.

Ongar veruligar kanningar eru gjørdar av, hvussu samlaðu veiðievnini hjá okkara fiskiflota broytast.

- Ein minni kanning er gjørd, men hendan einsamøll er alt ov veikt grundarlag til at gera sær eina heildarmeting av støðuni.

### Vantandi gransking

Kjartan vísti á, at gransking vantar av at kalla øllum tólum í fiskidagaskipanini.

- Skal fiskidagaskipanin framhaldandi verða ábyrgdarfull – eisini mótvegis umheiminum - mugu vit vita, hvat ávirkar veiðievnini, og hvussu hesi broytast.

Sum heild helt hann, at okkara fiskidagaskipan er ógvuliga skilagóð og leggur á ongan hátt upp til, at skip og bátar veiða »svartan« fisk.

- Eg haldi, at fiskidagaskipanin stendur sterk í altjóða høpi. Er skipanin rætt stillað og undir røttum eftirliti, eru fiskidagar helst besta skipanin av sínum slagi í øllum heiminum, segði Kjartan Hoydal á fiskivinnuráðstevnuni í Klaksvík.

### FAKTA

Eini tvey ár, áðrenn vit fingu núverandi fiskidagaskipan í 1996, hevði ein nevnd gjørt eitt uppskot um eina kvotuskipan, sum bleiv sett í verk í 1994. Vit kunnu siga, at toskaveiðan, sum vaks so ómetaliga nógv miðskeiðis í nítiárunum, »sprongdi« kvotuskipanina.

Enn ein nevnd varð nú sett at gera uppskot um eina fiskidagaskipan, ið bygdi á tað, sum »er« í sjónum – og ikki á tað, sum vit »halda« er í sjónum. Bæði vinna og ráðgeving høvdu umboð í báðum hesum nevndum og Kjartan Hoydal, sum tá var fiskivinnustjóri í Tinganesi, var formaður.

Kjartan Hoydal hevur serliga fýlst á, at ongar veruligar kanningar eru gjørdar av veiðitrýstinum, síðan vit fingu fiskidagaskipanina, og hann hevur eisini fýlst á, at Fiskirannsóknarstovan ikki vísir á óvissuna, sum er í hennara ráðgeving.